Umsett úr donskum. Í ivaspurningum verður víst til donsku upprunaútgávuna.

https://www.ft.dk/ripdf/samling/20241/redegoerelse/R2/20241_R2.pdf

Frágreiðing frá ráðharranum fyri norðurlendskt samstarv (Morten Dahlin) hin 9. oktober 2024

# Frágreiðing

um

## norðurlendska samstarvið 2024

(Skrivlig frágreiðing)

### 1 Innleiðsla

Endamálið við frágreiðingini er at upplýsa danska Fólkatingið um norðurlendska samstarvið, fíggjað av fíggjarætlanini hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum síðan seinastu frágreiðing. Frágreiðingin gevur eitt yvirlit yvir ítøkiligu átøkini innan tey ymsu ráðharraøkini, eins og raðfestingarnar og væntanirnar hjá stjórnini um menningina av samstarvinum.

Norðurlondini hava gott og tætt samstarv. Nú kríggj er í Ukraina, eru norðurlendsk virðir og fólkaræðisligir stovnar eisini undir álopi. Samfelagslig trygd og treystleiki eru komin meira á dagsskránna, og í síni frágreiðing frá juni 2023 løgdu norðurlendsku stats- og stjórnarleiðararnir dent á eina felags skyldu um at varðveita og styrkja treystleikan og krepputilbúgvingina fyri at fyribyrgja og lofta framtíðar kreppum. At Finnland og Svøríki eru blivin limir í NATO hevur styrkt norðurlendska samstarvið. At Norðurlond eru sameind í NATO skapar nýggjar møguleikar fyri styrktum trygdar- og verjupolitiskum samstarvi um at verja tey virði, sum binda okkum saman.

Evnið á fundinum hjá Norðurlandaráðnum í Reykjavík er trygd í Arktis. Á fundinum fer Norðurlandaráðið eisini at leggja fram nøkur uppskot til endurskoðan av Helsingforsavtaluni. Stjórnin gleðir seg til at fáa uppskotini og til at luttaka í einum orðaskifti um framtíðar norðurlendska samstarvið. Dentur verður m.a. lagdur á, um samstarvið í Norðurlendska Ráðharraráðnum og Norðurlandaráðnum eisini skal fevna um verju- og trygdarpolitikk, og á ynskið hjá Føroyum og Grønlandi um ein sterkari leiklut í norðurlendska samstarvinum undir egnum navni.

Visiónin hjá forsætisráðharrunum um Norðurlond sum tað mest kappingarføra, burðardygga og integreraða økið í heiminum er yvirskipaði karmurin fyri norðurlendska samstarvið. Nýggja Oyrasundsavtalan millum Danmark og Svøríki varð undirskrivað í vár og fer væntandi í gildi um ársskiftið. Avtalan fer at elva til integratión og vøkstur í Oyrasundsøkinum og harvið gera sítt til Visión 2030 hjá norðurlendsku forsætisráðharrunum.

Svøríki hevur formansskapin í Norðurlendska Ráðharraráðnum í 2024. Útgangsstøðið fyri

svenska formansskapin er eini tryggari, grønari og fríari Norðurlond, við serligum denti á integratión og økt flytføri tvørtur um landamørk. Norðurlendska Ráðharraráðið hevur gjørt eina strategiska greining av arbeiðnum við ferðafrælsi í Norðurlondum. Greiningin fer at vera grundarlag fyri framhaldandi politisku orðaskiftini um, hvussu framtíðar arbeiðið við ferðafrælsi skal skipast, effektiviserast og styrkjast frá 2025. Ráðharraráðið hevur umrøtt eitt uppskot um at broyta tíðarskeiðið 2025-2030 hjá Ferðafrælsisráðnum (Grænsehindringsrådet), sum skal samtykjast í oktober 2024.

Samrøðan og samstarvið millum Norðurlendska Ráðharraráðið og Norðurlandaráðið hevur stóran týdning fyri norðurlendska samstarvið. Fyrireikingin av nýggjum samstarvsætlanum fyri øll Ráðharraráðini fyri tíðarskeiðið 2025-2030 er næstan liðug, og svenski formansskapurin hevur tosað við Norðurlandaráðið og við norðurlendska sivilsamfelagið. Í seinna førinum eru almenn samráð gjørd. Hetta merkir, at teir 14 geirarnir hava orðað mál og partsmál fyri arbeiðið fram móti 2030 fyri at veita best møguligan stuðul til tey trý strategisku raðfestingarøkini undir Visión 2030: At Norðurlond skulu vera grøn, kappingarfør og sosialt burðardygg. Arbeiðið er grundað á greiningar av, hvar størstu avbjóðingarnar hjá Norðurlondum eru, og hvar samstarvið gevur mest nyttu. Matvørutrygd, tilbúgving og treystleiki verða gjøgnumgangandi evni í øllum samstarvsætlanum. Svenski formansskapurin í Norðurlendska Ráðharraráðnum legði fram eitt uppskot til samstarvsætlanirnar á forsætis- og nevndarfundunum á temafundinum hjá Norðurlandaráðnum hin 8. apríl í Føroyum. Norðurlandaráðið vísti sín stuðul til samstarvsætlanirnar og staðfesti, at samstarvsætlanirnar í stóran mun samsvaraðu við útspælið frá Norðurlandaráðnum frá september 2023. Á fundi hjá Norðurlandaráðnum í Reykjavík í oktober 2024 verður kunning og samrøða millum Norðurlendska Ráðharraráðið og Norðurlandaráðið um samstarvsætlanirnar, og eftir tað fær Norðurlandaráðið møguleika fyri at: góðkenna ætlanirnar sum eitt ráðharraráðsuppskot. Fyri fyrstu ferð verður ein samstarvsætlan gjørd fyri norðurlendsku samstarvsráðharrarnar, sum leggur dent á økta integratión av teimum norðurlendsku samfeløgunum.

*Altjóða samstarv*

Grundað á eina uttanhýsis greining fer MR-SAM fyri 2025 – 2027 í stóran mun at halda fram við teimum skráum og tematisku økjum, sum eru í dag.

Altjóða samstarvið, sum MR-SAM fíggjar, verður framt gjøgnum fýra høvuðsætlanir:

1. Nærøkissamstarvið hjá Norðurlondum í Baltikum og í Eystri
2. Nærøkissamstarvið hjá Norðurlondum í Vestri
3. Arktis Skrá
4. Sendistovuætlanin

Fleiri av ætlanunum verða munandi styrktar, ikki minst nærøkissamstarvið hjá Norðurlondum móti Vestri og Arktis. Eitt týdningarmikið endamál við átøkunum er, at tey eru við til at byggja upp samband og netverk á øllum stigum – millum fólk, felagsskapir og myndugleikar. Felags fyri ætlanirnar er, at tær eru skipaðar soleiðis, at tær fremja tvørgangandi sjónarmið knýtt at børnum og ungum, javnstøðu og burðardygga menning, og at tær skapa verkætlanir tvørtur um geirar.

Í 2022 yvirtók universitetið í Grønlandi (Ilisimatusarfik) í samstarvi við Norðurlandahúsið í Nuuk (NAPA), uppgávuna sum umsitingarstovnur fyri opnu arktisku puljuni undir arktisku skipanini. At flyta umsitingina til Grønlands er eitt týdningarmikið stig fyri víðari menningina av arktiska arbeiðnum hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum.

*Samstarv við sivilsamfelagið*

Norðurlendsku samstarvsráðharrarnir leggja stóran dent á tað, sum sivilsamfelagið ger fyri norðurlendsku integratiónina. Hetta er orsøkin til, at MR-SAM hevur valt at menna og styrkja DEMOS ætlanina í nýggju leiðbeinandi fíggjarætlanarkarmunum fyri 2025 til 2027, sum sivilsamfelagsfelagsskapir kunnu søkja stuðul ígjøgnum til teirra virksemi.

Fyri tað fyrsta verður fíggjarligi karmurin øktur munandi, og fyri tað næsta verður hann víðkaður soleiðis at tað í framtíðini eisini verður møguligt at søkja um rakstrarstuðul umframt verkætlanarstuðul.

Rakstrarstuðulurin verður reserveraður til sivilsamfelagsfelagsskapir, sum eru væl fyri, og sum hava norðurlendskt samstarv sum høvuðsendamál. Hetta fer at geva góðar møguleikar fyri bæði norðurlendskar og tjóðskaparligar felagsskapir, sum kunnu søkja um stuðul til rakstur og umsiting av teirra týdningarmikla arbeiði.

Avgerðir um útlutan av bæði verkætlanarstuðli og rakstrarstuðli verða tiknar av einum serfrøðingabólki, sum skal meta um umsóknirnar við denti á tað millumtjóðarliga í virkseminum og felagsskapinum.

8 milliónir krónur um árið eru settar av eyka til sivilsamfelagsfelagsskapir í fíggjarætlanini hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, soleiðis at puljan í alt telir 16 milliónir krónur í 2024 við tí endamáli at styrkja virknu luttøkuna hjá sivilsamfelagnum í tí norðurlendska arbeiðnum.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Arbeiðslív (MR-A)**

Í 2024 leggur Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Arbeiðslív (MR-A) høvuðsdent á grøna og talgilda umlegging á arbeiðsmarknaðinum. Evnið verður m.a. miðdepil fyri fundin hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum fyri Arbeiðslív í Skellefteå í døgunum 5.-6. november 2024 í Norðursvøríki, har ráðharrarnir serliga fara at umrøða avbjóðingarnar við at fáa neyðugu arbeiðsmegina og at passa framtíðarkrøv til førleikar. Nettupp Skellefteå er ein orkudepil fyri grøna orkuskiftið, har arbeiði verður gjørt fyri at tryggja og breiða út eftirspurdar førleikar.

2024 er ársdagurin fyri stovnanina av einum felags norðurlendskum arbeiðsmarknaði, sum framvegis er hornasteinurin í norðurlendskum samstarvi og í integratiónini millum Norðurlond. Lykla-aktørar úr øllum Norðurlondum luttóku í eini ráðstevnu í Malmø 18.-19. juni 2024 fyri at hátíðarhalda 70-ársdagin fyri søguligu avtaluna frá 1954 og fyri at umrøða aktuellar og framtíðar avbjóðingar. Fokus var serliga á møguleikan at stuðla arbeiðsmegini yvir um mørk, m.a. við at halda fram at arbeiða við forðingum fyri ferðafrælsi ella at ferðast til eitt annað norðurlendskt land. Her var rósandi umrøða av tí nýliga undirskrivaða skattasáttmálanum millum Danmark og Svøríki - eitt sjónligt dømi um eitt tiltak, sum styrkir samstarvið. Fokus var eisini á leiklutin hjá arbeiðsávísingini og framtíðar skipan, umframt hvussu vit í Norðurlondum kunnu nøkta framtíðar førleikatørvin til grøna orkuskiftið.

Eitt annað týdningarmikið fokus í 2024 er handfaringin av brotsverkum í arbeiðslívi, sum fevnir um skipaða misnýtslu av arbeiðsmegi og misnýtslu av sosialum skipanum, ið eru knýttar at arbeiðsmarknaðinum. Hetta fer ofta fram tvørtur um landamørk. Tí er eitt norðurlendsk-baltiskt samstarv um arbeiðstengd brotsverk stovnað, sum byrjaði á einum seminari 12. september undir svenskum formansskapi í Stockholm.

Eisini kann sigast, at 22.-24. mai 2024 var Danmark vertur fyri Norðurlendska Almannatryggingarfundinum, sum síðan 1935 hevur verið hildin fjórða hvørt ár í einum av

norðurlondunum. Fundurin savnaði meira enn 200 norðurlendskar leiðarar og serfrøðingar til framløgur og pallborðskjak um almannatryggingar grundað á trý temu: Nýskipanir, talgilding og eftirløn. Uttanhýsis fyrilestrarhaldarar frá ES, OECD og Norðurlondunum hjálptu til at tryggja, at ráðstevnan hevði høga og altjóða góðsku. Samstundis vórðu Føroyar upptiknar sum nýggjur limur í Norðurlendska Almannatryggingarfundinum (Nordisk Socialforsikringsmøde).

**Norðurlendska Ráharraráðið fyri Heilsu- og Sosialpolitikk (MR-S)**

Undir svenska formansskapinum í 2024 varð dentur lagdur á brotsfyribyrgjandi arbeiði og trygd í veiting av heilivági. Á sosiala økinum hevur ein norðurlendskur ráðharrafundur um børn og ung í kriminaliteti verið hildin, umframt ein ráðstevna um svik og brotsverk á almannatryggingaøkinum. Á heilsuøkinum hevur eisini verið hildin ein talgild ráðstevna um javna atgongd til heilsu í Norðurlondum, og ein ráðstevna um "antimikrobiel resistens" verður hildin í november 2024.

Til MR-S í apríl 2024 vóru tvey tematisk orðaskifti á skránni. Eitt orðaskifti handlaði um at tryggja atgongd til antibiotika í Norðurlondum og antibiotikaresistens, har avtalað varð at kanna møguleikan at fara í eitt norðurlendskt samstarv um innkeyp av smalspektraðum antibiotika. Hitt orðaskiftið var um, hvussu skíggjatíð ávirkar heilsu og trivnað hjá børnum og ungum. Eftir fundin góvu norðurlendsku ráðharrarnir út eina felags grein um skíggjatíð hjá børnum í svenska tíðarritinum Altinget.

Harafturat er í 2024 dentur áhaldandi lagdur á at fullfíggja samstarvsætlanina í geiranum fyri 2025-2030 og fyrstu arbeiðsætlanina fyri 2025-2027.

**Norðurlendska Ráharraráðið fyri Talgilding (MR-TALGILT)**

Fokus í arbeiðnum hjá MR-DIGITAL hevur verið eitt framhald av umboðnum hjá ráðnum fyri tíðarskeiðið 2021-2024, sum er grundað á ráðharrayvirlýsingina Digital North 2.0 og er við til at útinna Visión 2030 hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Harafturat hevur tað í 2024 verið lagdur dentur á at veita stuðul til fyrireikingina av arbeiðsætlanini fyri tíðarskeiðið 2025-2030, har ein høvuðsspurningur hevur verið, um verkætlanin Cross-border Digital Services (CBDS) skal halda fram.

Høvuðsendamálið hjá CBDS er at betra um talgildingina í Norðurlondunum og Baltikum, tá tað snýr seg um at lesa, arbeiða og reka fyritøku. CBDS samlar fleiri samstarvsverkætlanir, eitt nú NOBID-verkætlanina, sum arbeiðir fyri at geva borgarum og fyritøkum møguleika at brúka elektroniskar samleikar (eID) í Norðurlondunum og Baltikum innanfyri ES-lóggávuna. Nýtslan av eID'um í øllum londunum krevur m.a., at ein loysn kemur til, hvussu brúkarar kunnu eyðmerkjast rætt ígjøgnum eitt sokallað Identity Match, og at har kemur ein felags loysn til, hvussu eID'ir til vinnuligan samleika kunnu nýtast í Norðurlondum og Baltikum. 22. september 2023 samtykti MR-DIGITAL eina ráðharrayvirlýsing um tættari samstarv um at finna praktiskar loysnir upp á hesar trupulleikarnar. At CBDS heldur fram verður mett sum alneyðugt fyri arbeiðið hjá MR-DIGITAL, og tí verður væntað, at ætlanin fer at halda fram komandi tíðarskeiðið 2025-2030.

Eitt komandi serligt fokusøki verður verksetingin av eIDAS2 reglugerðini (Reglugerð (EU) 2024/1183) um evropeiska karmin fyri talgildan samleika. Reglugerðin krevur, at limalondini í ES menna eina talgilda samleikapengamappu, sum m.a. kann nýtast til eyðmerking, autentifikatión og deilan av skjølum. Verksetingin gevur nógvar møguleikar, men samstundis verður tað ein

umfatandi verkætlan. Í CBDS og NOBID verkætlanini verður væntandi greitt frá, hvussu norðurlendsku londini kunnu samstarva um hetta.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Búskapar- og Fíggjarpolitikk (MR-FINANS)**

Ráðharraráðið fyri Búskapar- og Fíggjarpolitikk heldur fram at hugsavna seg um núverandi fíggjarligar og búskaparligar avbjóðingar í Norðurlondum. Í juni 2024 helt svenski formansskapurin ein ráðharraráðsfund, har fokus var á vørumenningina í Norðurlondunum, umframt fíggjarpolitik í ljósinum av heimsfarsóttini. Harafturat gav Norðurlendska Ráðharraráðið í juni 2024 út tíðarritið Nordic Economic Policy Review vegna MR-Finans, har fokus er á fíggjarpolitikk í óvissum tíðum.

MR-Finans hevur samtykt eina samstarvsætlan fyri tíðarskeiðið 2025 til 2030, sum leggur dent á arbeiðið at skapa eini grøn og kappingarfør Norðurlond. Komandi arbeiðið hjá MR-Finans fer væntandi at grunda seg á at tryggja eitt kostnaðareffektivt og sosialt rættvíst grønt orkuskifti í Norðurlondum, umframt at styrkja kappingarførið, treystleikan og integratiónina í norðurlendskum búskapum.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Fiskiskap og Aling, Landbúnað, Matvørur og Skógrøkt (MR-FJLS)**

Undir svenska framsøguskapinum í 2024 varð dentur lagdur á tað felags arbeiðið innan tilbúgving og treystleika tvørtur um ábyrgdarøkini hjá Ráðharraráðnum fyri fiskiskap og aling, landbúnað, matvørur og skógrøkt, har geirarnir framhaldandi eru eyðkendir av globalari óvissu í veitingarketum og alheims spenningum orsakað av russisku innrásini í Ukraina og vaksandi avbjóðingunum við veðurlagsbroytingum. Á fundinum hjá ráðharraráðnum í juni 2024 varð ein ráðharrayvirlýsing um evnið samtykt.

Á fiskiøkinum verður dentur framvegis lagdur á bláa lívfeingisbúskapin við tí í hyggju at økja um nýtsluna av havtilfeingi, har fleiri verkætlanir eru settar í gongd, sum leggja dent á grøna, kappingarføra og sosialt burðardygga menning av fiskiskapi og akvakulturi. M.a. verður arbeiði gjørt fyri at styrkja norðurlendskt samstarv um gransking og menning í bláa lívfeingisbúskapinum sum framhald av Forsætisráðharra-yvirlýsingini um burðardyggan havbúskap og grønt orkuskifti frá 2022. Um várið 2024 gjørdi Ráðharraráðið, í samstarvi við NordForsk, fyri fyrstu ferð eina umsóknarumferð undir heitinum ”Sustainable fisheries from healthy seas”, har stuðul verður latin til stórar verkætlanir um ávirkanina av fiskiskapi á náttúruna innan ein samlaðan karm á 26 milliónir krónur. Harafturat verður um heystið 2024 skipað fyri ráðstevnu um samtilveru á sjónum við denti á havvindorku, fiskiskap og akvakultur. Eisini heldur arbeiðið fram við at seta í verk visiónsverkætlanina um ein burðardyggan havbúskap.

Á matvøruøkinum er dentur lagdur á norðurlendskt samstarv um tilbúgving. Fyri at styrkja samstarvið og netverkið í Norðurlondum var skipað fyri einari verkstovu um matvøru- og drekkivatnstrygd, umframt ein verkstova um tilbúgving í sambandi við útbrot av húsdjórasjúkum. Um heystið 2024 verður væntandi ein simuleringsvenjing innan matvørukreppu. Harafturat er ein frágreiðing gjørd, um hvat kann gerast fyri at fáa fólkið í Norðurlondunum at eta sunnari og meira burðardygt. Frágreiðingin er eitt ískoyti til norðurlendsku føðsluviðmælini, sum komu í 2023.

Í landbúnaðarøkinum hevur verið dentur á samtilveru á landi, har Norðurlendska Landbúnaðarnevndin (NKJ) og SamNordisk Skovforskning (SNS) gera eina frágreiðing, sum skal kortleggja avbjóðingarnar og møguleikarnar fyri samtilveru millum landbúnað, umhvørvi og

varandi orku í Norðurlondum. Í juni 2024 gjørdi Ráðharraráðið av, at samtilvera á landi og á sjógvi framhaldandi skulu raðfestast og vera við í arbeiðsætlanini hjá Ráðharraráðnum fyri 2025-27.

Innan skógarøkið eru framvegis revsitiltøk, sum banna innflutningi av timbri og timburvørum úr Russlandi og Belarus, og avmarkaðir møguleikar fyri innflutningi úr stórum pørtum av Ukraina, sum heldur fram at økja eftirspurningin eftir timbri úr norðurlendsku skógunum. Tað er størri uppmerksemi á innflutning frá nýggjum marknaðum sum úrslit av revsitiltøkunum ímóti Russlandi og Belarus. SamNordisk Skovforskning hevur havt ein væl staðsettan og vitjaðan bás á World Congress of Forest Research (IUFRO) í Stockholm í juni 2024. Granskingarstovnar, myndugleikar og skógargeirin í Norðurlondum og Baltikum stuðlaðu undan og undir ráðstevnuni, sum hevði tilsamans 4.300 luttakarar.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Løgmálaspurningar (MR–)JUST**

19.-20. september 2024 var árligi fundurin hjá norðurlendskum løgmálaráðharrum hildin í Uppsala undir svenskum formansskapi. Londini tosaðu um evni av felags norðurlendskum áhuga sum eitt nú fíggjarlig brotsverk (økonomiskan kriminalitet), menniskjahandil, skipað brotsverk, eins og fíggjarligu umstøðurnar hjá bandum og ávirkanina á aktørar í rættarskipanini. Í Danmark var í ár fokus á skipað brotsverk, sum eitt nú fevnir um talgildar tænastur og samstarv við triðjalond, við tí fyri eygað at fáa íblástur frá øðrum norðurlendskum londum.

Á fundinum var eisini eitt orðaskifti við forsetan á World Jewish Congress, Ronald S. Lauder, um fyribyrging av jødahatri. Harafturat var eitt orðaskifti við evropeisku leiðararnar í Meta, Google, Tik Tok og Snapchat um rekruttering til skipað brotsverk ígjøgnum netpallar. Eisini vórðu londini kunnað um arbeiðið í norðurlendsku arbeiðsbólkunum um netbrotsverk og menniskjahandil.

Undir svenska formansskapinum hava fundir eisini verið í embætismannanevndini (EK-JUST). Umframt at fyrireika og fylgja fundunum hjá norðurlendsku løgmálaráðharrunum upp, er uppgávan hjá embætismannanevndini at deila royndir og vitan millum norðurlendsku londini, eisini um lógarverkætlanir og -átøk, sum eru í gongd. Í ár hevur dentur verið lagdur á skipað og bandarelaterað brotsverk, harímillum danska bandapakkan IV, eins og menningina í Evroparáðnum í sambandi við umhvørvi og manna rættindi.

Á fundunum í nevndini hava eisini verið orðaskifti og raðfestingar av verkætlanarumsóknunum, sum eru móttiknar á løgmálaøkinum. Í hesum sambandi er stuðul veittur til fleiri ymiskar granskingar- og samstarvsverkætlanir, harímillum eitt seminar um ”restorative justice”. Harafturat eru frágreiðingar gjørdar um fleiri ymiskar arbeiðsbólkar og verkætlanir, harímillum arbeiðsbólkin um netbrotsverk og ta sonevndu "DigiLaw-verkætlanina", har granskarar í jura og talgilding hava kannað støðuna og eyðkennini við talgildingini av almennari umsiting.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Javnstøðu (MR-JÄM)**

Høvuðsraðfestingarnar hjá MR-JÄM undir svenska formansskapinum eru ærurelaterað stríð og harðskapur, arbeiðskor fyri tvørkynd og javnstøðuavbjóðingar fyri menn og dreingir. Eitt nú verður skipað fyri einum seminari um tilknýtið hjá kvinnum, ið eru føddar uttanríkis, til arbeiðsmarknaðin - og eisini verður ein ráðstevna um arbeiðsumstøður og luttøku hjá tvørkyndum. Harafturat verður ein komineraður MR-JÄM og NB8 fundur við baltisku javnstøðuráðharrunum, og har verður eitt orðaskifti um ærureleterað stríð í etniskum minnilutaumhvørvum.

Síðan 2022 hevur MR-JÄM hugsavnað seg um vaksandi mótstøðuna, sum merkist um allan heimin, móti kvinnurættindum og LGBT+ fólkum. Hetta verður gjørt gjøgnum átakið "Pushing back the push-back". Hetta hevur eitt nú havt við sær eitt strategiskt samstarv við norðurlendsku sendistovurnar í Póllandi og Chile. Átakið verður støðugt ment við nýggjum tiltøkum.

Í 2025 ætlar finski formansskapurin í Norðurlendska Ráðharraráðnum eitt nú at fokusera upp á avbjóðingarnar við javnstøðu hjá monnum, harðskap móti kvinnum og hættir til dátuinnsavning um LGBT+ persónar.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Mentan (MR-K)**

Undir svenska formansskapinum í Norðurlendska Ráðharraráðnum var serligur dentur lagdur á tilbúgving í mentanargeiranum í fyrru helvt av 2024. Í hesum sambandi hittust norðurlendsku og baltisku mentanarmálaráðharrarnir í Stockholm í mai, har teir tosaðu um evnið. Ráðharrarnir undirskrivaðu eina felags yvirlýsing, sum leggur dent á týdningin av, at norðurlendsku og baltisku londini arbeiða saman og deila vitan um, hvussu mentanararvurin kann verjast, og hvussu man kann varðveita eitt virkið mentanarlív, um tað verður kreppa, kríggi ella í øðrum støðum. Fráboðanin fordømir eisini hernaðarliga ágangin hjá Russlandi í Ukraina, sum umframt at rætta seg eftir sivilum málum, eisini umfatar tilætlaða oyðilegging av ukrainskum mentanararvi.

Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Mentan hevur hildið á við at arbeiða við nýggju mentanarpolitisku samstarvsætlanini fyri 2025-2030. Eitt uppskot til samstarvsætlanina varð sent út til almenna hoyring í apríl, sum førdi við sær 11 hoyringssvar frá aktørum í øllum Norðurlondum, sum eru partur av arbeiðinum við samstarvsætlanini. Samstundis er ein tilgongd byrjað at fyrireika eina arbeiðsætlan fyri 2025-2027, sum fer at konkretisera partsmálini í samstarvsætlanini, sum snúgva seg um átøk og handlingsspor.

Í fyrru helvt av 2024 hevur eisini verið tos um framtíðar formatið fyri handanina av Virðislønum Norðurlandaráðsins. Í 2025 yvirtaka norðurlendsku samstarvsráðharrarnir fíggingina av virðislønunum og virðislønarhandanini. Út frá hesum er týdningarmikið at hugsa um, hvussu mentanarvirðislønirnar framhaldandi kunnu hava eitt greitt mentanarpolitiskt rótfesti og vera við til at økja um vitanina um norðurlendska list og mentan bæði í Norðurlondum og uttanfyri. Hetta er eisini týdningarmikið í mun til at stuðla partsmálinum í mentanarpolitisku samstarvsætlanini um at styrkja samskiftið og miðlingina av norðurlendskari list og mentan uttanfyri Norðurlond.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Umhvørvi og Veðurlag (MR-MK)**

Umhvørvis- og veðurlagssamstarvið í norðurlondunum í 2024 hevur serliga snúð seg um framtíðar samstarvsætlanina fyri geiran í 2025-2030, sum snýr seg um trídupultu kreppuna við veðurlagsbroytingum, lívmargfeldi og dálking. Ætlanin hevur m.a. sum mál, at Norðurlond verða verandi leiðandi í umskiftinum ímóti veðurlagsneutraliteti og veðurlagsresiliensi, og at arbeiða fyri eini ambitiøsari implementering av Parísaravtaluni á altjóða stigi. Málini hava partvíst íblástur frá tilmælum í verkætlanini "Nordic Stocktaking and ambitions – pathways to climate neutrality" frá 2023. Harafturat verður dentur lagdur á at halda fram við týdningarmikla arbeiðnum innan luftdálking og grøna skipaferðslu, og eisini verður meira fokus á nýggja tøkni so sum CO2 fong, nýtslu og goymslu (CCUS) og veðurlagstillaging.

Arbeiðið við vernd av lívmargfeldinum verður grundað á Kunming-Montreal avtaluna undir sáttmálanum um lívmargfeldi (CBD) til at tryggja alheims gerðir so sum eitt nú at steðga tapi av

lívmargfeldi. Samstundis er samstarv sett í verk um vernd av lívmargfeldi í ES-sambandi og lokalt, har vinnulív og sivilsamfelag og onnur verða tikin við. Burðardygg umsiting og vernd av sjóøkjum í Norðurlondum, umvæling av náttúrutypum og náttúrugrundaðar loysnir, sum verja lívmargfeldi og samstundis hava veðurlagsávirkan, fara framhaldandi at vera nógv í fokus.

Samstarvsætlanin hevur eisini sum mál at minka um vistfrøðiligu nýtsluna í Norðurlondum, og ætlanin er ein drívmegi í evropeiskum og altjóða avtalum um ringbúskap og minking av vandamiklum evnum og dálking. Hetta fevnir um at taka burtur forðingar fyri sirkularitet, útfasa vandamikil evni og fremja norðurlendska umhvørvismerkið, sum er 'Svanurin'.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri burðardyggan vøkstur (MR-vøkstur)**

Í vinnuøkinum varð ein nýggj samstarvsætlan fyri 2025-2030 samtykt í 2024. Ætlanin er gjørd fyri at røkka málunum hjá londunum um at seta ferð á grøna orkuskiftið og finna loysnir upp á vinnupolitiskar avbjóðingar so sum ta vaksandi alheimskappingina, geopolitiskar avbjóðingar og demografiskar broytingar. Ítøkiliga fer ætlanin at arbeiða fyri grønum og talgildum umskifti, burðardyggum handilsmodellum og ringbúskapi og styrkja økis- og alheims marknaðarmøguleikarnar hjá norðurlendskum fyritøkum. Harafturat er dentur lagdur á at minka byrðurnar hjá norðurlendskum fyritøkum – serliga við at lætta um burðardygdarfrágreiðingar. Tey ítøkiligu átøkini, sum skulu mynda samstarvsætlanina, verða fyrireikað um heystið 2024.

Í 2024 varð ein nýggj samstarvsætlan samtykt, sum hevur til endamáls at stuðla málinum um eini grøn, sosialt inkluderandi og kappingarfør Norðurlond, ið skal fremjast við at arbeiða fyri einum rættvísum og grønum orkuskifti, sum ikki økir ójavnan millum bygd og bý. Í 2024 hevur dentur serliga verið lagdur á, hvussu norðurlendskur økispolitikkur best kann vera við til at tryggja sivila tilbúgving og treystleika í bygdaøkjunum í Norðurlondum í krepputíðum. Eisini verður stuðul latin til marknanevndirnar og til Norðurlendska Atlantssamstarvið.

Á orkuøkinum hevur samstarvið í 2024 fyrst og fremst snúð seg um at fastleggja samstarvsætlanina fyri økið í 2025-2030. Ætlanin leggur dent á, hvussu orkusamstarvið kann tryggja høga veitingartrygd, styrkja norðurlendsku støðuna innan nýggja orkutøkni og orkueffektivisering, umframt at betra um norðurlendska elmarknaðin ígjøgnum økta elektrifisering, fleksibilitet og betri elinfrastruktur. Síðani verður dentur lagdur á at styrkja Norðurlond sum ein aktør í orkusamstarvinum í ES og altjóða felagsskapum.

**Norðurlendska Ráðharraráðið fyri Útbúgving og Gransking (MR- U)**

Samstarvsætlanin hjá MR-U fyri 2025-2030 er grundað á felags norðurlendskar avbjóðingar og raðfestingar við denti á góðsku-útbúgving frá ungum árum, lívlanga læring, fólkaræðisligar førleikar, kritiska hugsan, talgilt dannilsi o.s.fr. Færri fólk mugu falla uttanfyri útbúgving og arbeiðslív, og dentur er lagdur á førleikatørv, tørvin á arbeiðsmegi frá yrkislærdum og grøna orkuskiftið. Svenski formansskapurin í 2024 hevur STEM (Science, Technology, Engineering and Mathematics) sum eitt høvuðstema. Orðaskiftið á ráðharrafundinum í mai var grundað á PISA úrslitini og snúði seg um teir grundleggjandi førleikar og týdningin av at skapa áhuga fyri STEM-lærugreinum á ungum árum, harímillum at tryggja betri javnstøðu millum kynini. Trivnaður og nýtslan av skíggjum fylla alsamt meira í norðurlendska orðaskiftinum. Danmark er eitt av fremstu londunum. Eitt annað fokusøki er norðurlendska málsamstarvið, og í mai skrivaðu ráðharrarnir undir eina nýggja mályvirlýsing, og ítøkilig átøk skulu definerast í komandi arbeiðsætlanum.

Til ein fund hjá Norðurlandaráðnum í oktober 2023 legði MR-U fram eina frágreiðing um granskingarpolitikk. Frágreiðingin vísir, at norðurlendskt granskingarsamstarv heldur fram at skapa meirvirði fyri øll Norðurlond. Hetta er galdandi bæði fyri strategisk og praktisk øki og tema, og fyri fría og grundleggjandi gransking. Víst verður eisini á fleiri tilmæli í sambandi við framhaldandi langtíðar raðfesting av og íløgum í gransking. Í 2024 hevur Ráðharraráðið arbeitt fyri at stuðla týdningarmikla leiklutinum, sum granskingar- og granskingarsamstarvið hevur í sambandi við 2030-visiónina um, at Norðurlond skulu gerast heimsins mest burðardygga og integrerað økið, við denti á grøna orkuskiftið, kappingarføri og sosiala burðardygd.

**Norðurlendsk ætlan um integratión av flóttafólki og tilflytarum**

Á integratiónsøkinum heldur norðurlendska ætlanin fram um integratión av flóttafólki og tilflytarum, sum fer at stuðla norðurlendska samstarvinum við fokus á at deila royndir og menna nýggja vitan um góðar ætlanir á integratiónsøkinum. Norðurlendska Ráðharraráðið hevur ábyrgd av ætlanini, og Útlendinga- og Integrationsmálaráðið er við í einum bólki, sum regluliga kjakast um evni í Norðurlondum innan integratiónsøkið. Útbúgving og arbeiðsmarknaðurin fara framhaldandi at vera høvuðsevni í samstarvinum. Harafturat fer Danmark at leggja serligan dent á at fyribyrgja negativt sosialt eftirlit. Eisini fer samstarvið at leggja dent á at deila royndir um móttøkuna í Norðurlondunum av fólki, sum eru rikin úr Ukraina.

**Samstarvið innan samferðslu**

Á samferðsluøkinum hittast ráðharrarnir óformliga fyri at tosa um og samskipa norðurlendskar støður undan stórum fundum, so sum á fundum í Ráðharraráðnum í ES o.s.fr. Norðurlendsku samferðsluráðharrarnir høvdu seinast eitt orðaskifti hin 17. juni áðrenn TTE-nevndarfundin hin 18. juni 2024. Haraftrat var ein óformligur fundur millum norðurlendsku samferðsluráðharrarnar tann 14. august 2024.

Norðurlondini hava eitt felags mál um at gerast tað mest burðardygga og integreraða økið í heiminum. Samrøður eru eisini leypandi millum norðurlendsku samferðsluráðharrarnar um, hvussu Norðurlond best kunnu leggja trýst á altjóða grøna orkuskiftið í samferðslugeiranum. Í ljósinum av ólógligu innrásini hjá Russlandi í Ukraina hevur orðaskifti eisini verið um tilbúgving innan samferðsluøkið.

**Forðingar fyri ferðafrælsi (Grænsehindringer)**

Loysnir eru funnar á nógvum forðingum fyri ferðafrælsi (grænsehindringer), men nakrar mangla enn, og arbeitt verður eisini víðari við at avmarka negativu avleiðingarnar av marknaavmarkingum so nógv sum gjørligt í kreppustøðum. Samstarvsráðharrarnir og Ferðafrælsisráðið eru í áhaldandi dialogi og hittust seinast í Malmø í juni 2024, og fara í samstarvi við geirarnar og nationalar myndugleikar at leita eftir loysnum á teimum eyðmerktu marknaforðingunum. Niðanfyri er støðan á arbeiðinum við útvaldum ferðaforðingum

*Oyrasundsavtalan*

Í 2003 gjørdu Danmark og Svøríki núverandi Oyrasundsavtaluna, sum stuðlar einum integreraðum arbeiðsmarknaði í Oyrasundsøkinum við at beina burtur fleiri skattaforðingar fyri tey túsundtals fólk, sum ferðast millum Danmark og Svøríki fyri at koma til arbeiðis. Oyrasundsavtalan hevur

riggað sum ætlað, men samstundis hevur vaksandi eftirspurningur verið frá vinnulívinum og pendlarum báðumegin Oyrasund eftir einari dagføring av tí meira enn 20 ára gomlu avtaluni. Tí gjørdu danska og svenska stjórnin hin 10. juni 2024 eina nýggja Oyrasundsavtalu, sum er ein dagføring og betring av galdandi Oyrasundsavtaluni. Nýggja Oyrasundsavtalan skal vera við til at gera tann frammanundan væl virkandi arbeiðsmarknaðin hinumegin Oyrasund enn betri. M.a. hevur nýggja Oyrasundsavtalan færri fyrisitingarligar byrður við sær fyri bæði pendlarar og arbeiðsgevarar, og avtalan foreinklar og ruddar eisini upp í núverandi skattareglum.

Skattamálaráðið hevur avtalað við svenska fíggjarmálaráðið, at arbeitt skal verða fyri, at endurskoðaða Oyrasundsavtalan fer í gildi hin 1. januar 2025. Hetta krevur, at: lógar- uppskotið, verður samtykt av danska Fólkatinginum og Ríkisdegnum í 2024.

*Skattafrágreiðingin hjá Ferðafrælsisráðnum (Grænsehindringsrådet)*

Út frá tilmæli frá Nevndini fyri Vøkstur og Menning í Norðurlondum samtykti Norðurlandaráðið, grundað á grein 45 og 56 í Helsingforsavtaluni, hin 9. apríl 2024 eitt tilmæli um, at norðurlendsku stjórnirnar seta í verk eina gjøgnumgongd og endurskoðan av norðurlendska skattasáttmálanum grundað á loysnirnar í frágreiðingini ”Arbejde på tværs af grænser i Norden - forslag til forenkling af de nordiske skatteregler med fokus på øget mobilitet. ”

Stjórnirnar í Norðurlondum hava tikið uppskotini í frágreiðingini til sín. Hetta eru uppskot um útlutan av skattarættinum sambært skattaavtalum, umframt uppskot knýtt at innanlands lóg í londunum. Í sambandi við uppskotini um skattaavtalur, er tað í OECD arbeiði í gongd, har norðurlendsku londini luttaka. Orðaskiftið handlar um meginreglurnar fyri skatting av hybrid- og fjararbeiði í sambandi við viðurskifti, ið eru knýtt at føstum rakstrarstaði við heimaarbeiði. Arbeiðið verður í høvuðsheitum framt í arbeiðsbólkinum, sum mennir OECD-modellið fyri skattasáttmálar, sum er grundarlagið í norðurlendska avtaluni og øðrum tvílanda-skattaavtalum hjá Norðurlondunum. Arbeiðið hjá OECD hevur góðar fortreytir fyri at skapa eina meira einsháttaða og greiðari nýtslu av skattasáttmálareglunum á hesum øki, ikki bara á norðurlendskum stigi, men eisini á alheimsstigi.

Í ljósinum av arbeiðinum í OECD ætla norðurlendsku stjórnirnar ikki at lata upp fyri endursamráðingum um norðurlendska skattasáttmálan í løtuni. Stjórnirnar fara tó at halda fram at arbeiða fyri at betra um umstøðurnar fyri at arbeiða tvørtur um landamørk í Norðurlondum. Í hesum arbeiðnum fara uppskotini í frágreiðingini at spæla ein leiklut.

*Felags norðurlendsk fólkaskráseting*

Eftir umbøn frá Ferðafrælsisráðinum (Grænsehindringsrådet) hava fólkayvirlitsmyndugleikarnir í Norðurlondunum hildið fram at tosa um møguleikarnar at seta á stovn eina sjálvvirkandi skipan, har persónsupplýsingar kunnu deilast millum norðurlendsku fólkayvirlitini. Tosið hevur verið grundað á eina frágreiðing frá Finnlandi um royndirnar, sum Finnland hevur gjørt í sambandi við verksetanina av líknandi skipan við Estland. Tað hevur víst seg, at ein sjálvvirkandi skipan um av deilan av upplýsingum, sum Ferðafrælsisráðið (Grænsehindringsrådet) hevur skotið upp, fer at vera sett í samband við fleiri týðandi løgfrøðiligar og tøkniligar avbjóðingar, og tí hava norðurlendsku londini ikki í løtuni funnið grundarlag fyri at fara undir arbeiðið við at dagføra norðurlendska sáttmálan um fólkayvirlit. Evnið fer framhaldandi at verða umrøtt á árligu fundunum hjá norðurlendsku fólkayvirlitsmyndugleikunum, eins og Danmark hevur tikið initiativ til at

endurnýggja tøkniligu loysnina, sum verður brúkt í sambandi við núverandi norðurlendska samstarvið um fólkayvirlit, soleiðis at loysnin í framtíðini eisini kann stuðla undir eina møguligari víðari deiling av persónsupplýsingum millum londini.

*Talgild samleikaprógv í Svøríki*

Í dag er tað møguligt at brúka danska MitID og svenska Freja eID til at eyðmerkja teg í grannalandinum. Í løtuni eru tó ógvuliga fáir sviar, sum hava Freja eID, tí vanligasta eID í Svøríki er privata BankID, sum ikki kann brúkast tvørtur um landamørk, tí tað ikki er farið ígjøgnum kravdu ES tilgongdina, sum loyvir nýtslu av eID í øllum ES. Harafturat er kravt fyri ein stóran part av borgara-tænastunum, at borgaranummarið (CPR-nummarið í Danmark) kann rigga við einum eID úr einum øðrum landi. Í Danmark er ein funka ment, sum knýtir CPR-nummar við fremmandum e-samleikaprógvum, men ein slík funka er enn ikki í Svøríki. Í báðum londum er bert eitt avmarkað tal av talgildum tænastum, sum eru tillagaðar, so tær kunnu fáa eID frá borgarum úr øðrum londum. Samanumtikið er møguleikin at brúka donsk og svensk eID tvørtur um landamørk ógvuliga avmarkaður í dag. Digitaliseringsstyrelsen mennir eina loysn, sum væntast at økja um møguleikan hjá myndugleikum at móttaka eitt útlendskt eID, sum samsvarar við reglugerðina Single Digital Gateway (Forordning (EU) 2018/1724). Loysnin kemur væntandi upp á pláss í seinnu helvt av 2025.

*Talgildir samleikar í Norðurlondum*

Fyri at samsvara Single Digital Gateway-reglugerðini (Forordning (EU) 2018/1724) og fyri at stuðla nýtsluni av eID frá øðrum ES londum og teimum norðurlendsku londunum, er Digitaliseringsstyrelsen farin undir at menna eina samanseting millum tvær skipanir; eID-gateway og NemLog-in. Samansetingin fer at merkja, at brúkarar í Norðurlondum og ES fáa møguleika at brúka eitt eID í nógv fleiri almennum talgildum tænastum enn í dag. Samansetingin kemur væntandi upp á pláss í seinnu helvt av 2025, og eftir tað fáa myndugleikarnir møguleika at taka ímóti einum fráboðaðum eID frá øðrum ES londum, sum verða brúkt í teirra talgildu tænastum. Saman við eini komandi loysn um Identity Matching verður væntað, at verkætlanin fer at viðvirka til at minka um talgildar forðingar fyri ferðafrælsi í Norðurlondum.

Tó eru enn ósvaraðir spurningar knýttir at hvussu vinnu-eID kunnu nýtast. Hesir spurningar mugu avklárast, áðrenn fyritøkur kunnu brúka eID í øllum Norðurlondum. Tó verða nakrir av hesum spurningunum væntandi avkláraðir í komandi rættarskjølum til eIDAS reglugerðina, sum m.a. skipa evropeiska karmin fyri talgilda sam- leika.

*Viðurkenning av yrkisútbúgvingum og førleikum*

Í sambandi við ad hoc bólkin um viðurkenning av yrkisútbúgvingum varð frágreiðingin “Recognition of vocational education and training (EQF-levels 3 to 5) in the Nordic countries” útgivin í 2023. Frágreiðingin snýr seg um, hvussu landsins myndugleikar arbeiða við viðurkenning av yrkisútbúgvingum og førleikum, og kann nýtast sum amboð í norðurlendska samstarvinum um yrkisútbúgvingar. Í framhaldi av hesum er peningur settur av (frá MR-U) til eina uppfylgjandi verkætlan í 2024-2025 um viðurkenning av yrkisfakligum útbúgvingum og -førleikum. Verkætlanin leggur dent á at styrkja verandi samstarv og deilan av upplýsingum millum NOR RIC-

skrivstovurnar (norðurlendska netverkið av nationalum miðstøðum fyri viðurkenning). Svenska Universitets- och högskolerådet (UHR) hevur umsitingina, og øll norðurlendsku londini eru við.

*Munir í byggireglum*

Í byggivinnuni hava norðurlendsku londini arbeitt tætt saman síðan 2021 í Nordic Sustainable Construction fyri norðurlendskar pengar. Úrslitið er ein lóggáva og vitan, sum minkar um veðurlags- og umhvørvisávirkanina frá bygging, og at Norðurlond verða sædd sum fremst á økinum altjóða. Peningurin gongur út í 2024, men norðurlendsku byggi- og bústaðarráðharrarnir síggja stórar møguleikar í eini nýggjari ætlan, sum byggir á hesi fýra evni: Veðurlag, Sirkularitet, Talgilding og ES.

Stýribólkurin fyri harmonisering av byggireglugerðum fyri ein meira integreraðan byggimarknað í Norðurlondum hevur røtur í myndugleikum í Norðurlondunum. Tað er eitt forum, har núverandi royndir kunnu deilast, og átøk, sum stuðla grønum vøkstri fyri byggivinnuna, kunnu setast í gongd og fremjast. Í 2023 og 2024 hevur serligur dentur verið lagdur á “ensretning” og eitt grønt fokus í eini komandi dagføring av nationalum ískoyti til eurocodes.